


# Kunning: Stuðul til gransking

17. novembur 2022

# Tvær stuðulsskipanir

granskingarráðið
RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

Arbeiðsmarknaðurin
frameftir

# Alment

- Umsóknarfreist: 15. februar, kl. 12.00
- Tøk fígging:
  - Stuðul til gransking: 7,5 mió. kr. (*treytað av játtan á FL*)
  - Stuðul til arbeiðsmarknaðargransking: upp til 2,5 mió. kr.
  - Í mesta lagi 2/3 av kostnaðinum kann stuðlast av Granskingarráðnum
  - Stuðulsupphæddir: í minsta lagi 300.000 kr., í mesta lagi 1 mió. kr. (tó í mesta lagi 1,5 mió. kr. til ph.d)




- Stuðul kann latast til gransking, ið er:
  - framd av føroyskum granskarum ella
  - framd í samstarvi við føroyskar granskingarstovnar ella fyritøkur ella
  - mett at hava samfelagsligan týdning fyri Føroyar



# Øki – Stuðul til gransking

- Frítt stuðulsøki:
  - Stuðul kann søkjast til gransking á nærum øllum hugsandi økjum
  - Tó so, gjarna tengt at ella ein víðkan av verandi granskingarøkjum í Føroyum
- Stuðul kann verða játtaður til grund- og nýtslugransking:
  - Ph.d.-verkætlanir
  - Verkætlanir longri enn 6 mánaðir
  - Vinnugranskingarverkætlanir

# Øki – Arbeiðsmarknaðargransking

- Skilmarkað stuðulsøki:
  - Verkætlanir, sum fáa stuðul, skulu gagna arbeiðsmarknaðinum frameftir.
  - Verkætlanir kunnu fevna um allan arbeiðsmarknaðin, eins og um viðurskifti, sum hava serligan týdning fyri starvsfólk í ávísari vinnu ella á ávísum starvsøki.
  - Virkisøkið er ikki avmarkað, men tað er ein treyt, at talan er um gransking í viðurskiftum, sum eru viðkomandi fyri partarnar á arbeiðsmarknaðinum, ella gransking í øðrum arbeiðsmarknaðarviðurskiftum, sum tørvur er á at fáa lýst.
- Stuðul kann verða játtaður til:
  - Ph.d.-verkætlanir
  - Verkætlanir longri enn 6 mánaðir

# Raðfestingar

- Tað verður mett sum ein fyrimunir fyri verkætlanir, um tær styrkja føroyska granskingarumhvørvið við:
  - Dátum og varandi vitan og førleikum
  - Samstarvi millum fleiri granskarar/granskingareindir og ella/vinnufyritøkur
  - Altjóða samstarvi og flytføri



# Verkætlanarsløg

- Ph.d.-verkætlanir
  - Fígging til 3 ára ph.d.-verkætlanir
  - Innskriving á universitet, gjarna eisini samstarv við aðrar stovnar og/ella fyritøkur
  - Í minsta lagi tveir vegleiðarar, gjarna úr ymsum londum
  - Granskingaruppihald á øðrum staði partur av verkætlanini
- Postdoc og vinnuligar verkætlanir
  - Verkætlanarleiðari skal vera granskari



# Formlig krøv

- Umsóknir skulu sendast umvegis umsokn.com
- Allur kjarnatekstur skal vera á enskum
- Verkætlanarskeið: Í minsta lagi 6 mánaðir, í mesta lagi 4 ár, byrjanardagur 1. august 2023 ella seinni
- Verkætlanartoymi við stovni/fyritøku, verkætlanarleiðara og øðrum kjarnaluttakarum
- Samandráttur, samskiftisætlan, Dátuhandfaringarætlan, Etiskir og løgfrøðiligir karmar og tilvísingar

# Formlig krøv 2

- Fylgiskjøl:
  - Verkætlanarlýsing og arbeiðsætlan (Vinarliga nýt frymilin)*
  - Fíggjarætlan, CV, samstarvsváttanir*
  - Etikkur, prógv (um viðkomandi)
- Tillagingar í krøvum hetta umfarið
  - Skriva 3-5 stikkorð, sum lýsa verkætlanina, í raðfestari røð
  - Skjót upp í mesta lagi 3 fólk, sum vit kunnu heita á at meta umsóknina
  - Upplýs, um líknandi umsókn er vorðin send inn áður
  - Gev gætur, at mesta longd á skjølum er tillagað
- *Vinarliga les ‘Terms of Reference’*

# Góð ráð til umsøkjarar

- **Skráset** eina (næstan) endaliga útgávu av umsókníni **fleiri dagar áðrenn freistina**
- **Ansa eftir** bert at arbeiða við umsókníni í einum **kaga/vindeyga** í senn
- **Skriva tekstin** til umsóknarteigarnar í einum tekstforriti, **goym tekstin á egnari teldu** og avrita/set tekstin inn í umsóknarportalin
- **Goym** tínar broytingar á portalinum. Dátur verða goymdar sjálvvirkandi, men tú kanst eisini klikkja á **goym flugubeinið**
- **Navngev fylgiskjøl sambært slagi** (verkætlanarlýsing, arbeiðsætlan o.s.fr.) og við **stytting**
- **Ansa eftir ikki at brongla** ella **talgilt undirskriva** tíni pdf-skjøl
- **Eftirkanna**, tá øll fylgiskjølini eru innlisin, at tað ber til at lata samlaðu umsóknina upp og at øll skjølini verða víst rætt, áðrenn tú sendir umsóknina avstað.




VALDEMAR LÜTZEN
www